# Íslendsk skúlabørn lósu Sosialin

**Í Greinivíkar skúla høvud tey herfyri »evropiskan dag«, har tey hoyrdu og lósu fleiri av heimsins málum – eisini føroyskum**

EVROPISKUR DAGUR
*Eirikur Lindenskov*



*Børnunum dámdu væl at lesa Sosialin, tí har var nógv, ið tey skiltu, sigur skúlastjórin, Björn Ingólfsson, sum eisini hevur tikið hesar myndirnar*

Í síðsta mánaði høvdu tey á Greinivíkar skúla í Greinivík í Íslandi ein »evrópiskan dag«. Ein táttur hendan dagin var at lesa føroysk bløð, sum skúlastjórin hevði biðið um frá Sosialinum.

– Tað er so stuttligt at royna at lesa føroyskt, tí vit skilja næstan alt, hóast vit ikki hava lært tað, segði Björn Ingólfsson, skúlastjóri við Sosialin.

– Evrópiski dagurin fór fram á tann hátt, at allir næmingar fingu at hoyra okkurt úr ymsum evropiskum málum. Eitt nú fóru næmingar úr triðja flokki, sum dugdi enskt, í fyrsta og annan flokk, til tess at lata tey hoyra eitt sindur av enskum máli, sum teir lósu úr eini enskari barnabók, sigur skúlastjórin.

Í eldru flokkunum, 5. til 10. flokk, lósu lærarar ymiskt, teir kendu av øðrum málum, eitt nú týskum, fronskum og finskum.

– Í danskttímanum, sum eg hevði í tíggjunda flokki royndi eg meg í føroyskum, sum eg tó ikki dugi rættuliga, men klári at lesa, sigur Björn Ingólfsson, skúlastjóri, og heldur fram.

– »Sosialurin féll vel í kramið og líka brandarinn sem ég prentaði út af heimasíðu B36 um manninn sem fór til himna af því að hann gekk framhjá húsi HB og söng: Við verðum Færeyjameistarar í ár!«, sigur Björn Ingólfsson at enda






*Íslendskir næmingar við Sosialinum, sum tey lósu, tá tey høvdu »evrópiskan dag« í síðsta mánaði*





# Føroyskt mono

**Í komandi mánað byrjar SvF at senda umvegis Televarpið, og hetta merkir, at sent verður talgilt og í stereo. Hjá øllum uttan SvF**



*Hóast byrjað verður at senda digitalt, so verður SvF framvegis í analog og mono.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

SJÓNVARP
*Heri á Rógvi*

Kundarnir hjá Televarpinum í høvuðsstaðnum og á Skálafjørðinum fáa í komandi mánað møguleikan at síggja SvF bæði sum vanligt er nú og umvegis Televarpið.

Sambært Jónheðin Tróndheim, tekniskur leiðari hjá SvF, verður myndagóðskan í besta føri líka góð.

SvF sendir í verandi støðu umvegis teirra sendinet sjónvarp í analog formi og í mono.

Hetta er í dag ógvuliga óvanligt. Flestu rásir senda í stereo, men við verandi sendiútgerð fær SvF ikki gjørt hetta.

Flestu útlendsku rásir hava eisini skift yvir til at senda digital(talgilt). Við at senda null og eitt tøl í hópatal fært tú oftast eina nógv betri myndagóðsku og munandi fleiri møguleikar.

Sambært tekniska leiðaranum í SvF skulu nógvir pengar til, um føroyingar skulu síggja SvF í talgildum og stereo formi.

– Eg tori ikki at siga nakra ávísa upphædd, men tað er í øllum førum ein tvísifrað milliónaupphædd, sigur Jónheðin Tróndheim.

Hann vísir á, at Televarpið bert røkkur til ein part av Føroya fólki, men SvF hevur skyldu til at senda til øll. Kundarnir hjá Televarpið sleppa at síggja SvF í talgildum formi, men talan verður um, at analog signalið verður gjørt um til eitt talgilt signal. Allir teir vanligu møguleikarnir nútíðar talgildu rásum verða ikki tøkir – frá byrjan í øllum førum.

Hjá SvF verður alt tikið upp, og tey kundu eisini klárað at sent í stereo, men verandi sendarar eru gjørdir til analog, og tískil er hetta ikki gjørligt.

Í 2002 ljóðar tað kanska ikki av so øgiliga nógvum at kunna siga, at vit síggja sjónvarp í mono og analog. Vinnumálaráðið, ið eigur sendiútgerðina, SvF nýtir at senda við, hevur sett ein arbeiðsbólk at hyggja nærri at talgilding og sendiorkuna v.m. Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking úr Vinnumálaráðnum, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Við gomlu skipanini hjá Rás Tórshavn varð sent analog í mono.

Tróndur Djurhuus, stjóri fyri Televarpið, upplýsir, at Televarpið hevur gjørt íløgur í nýggja útgerð til at senda talgilt. Av verandi útgerð hjá Rás Tórshavn eru tað bert sjálvar parabolskálirnar, ið verða nýttar. Kostnaðurin av nýggju íløgunum er ikki upplýstur fyri okkum.

Ítróttarhøllin í Kollafirði:

# Áhugafelag skal byggja høllina

**Tað verður eitt áhugafelag, sum skal standa á odda fyri byggingini av einari ítróttarhøll í Kollafirði. Landið og kommunan fara at fíggja hvør sín part**

ÍTRÓTTARHØLL
*Heri á Rógvi*

Tað verður ikki Tórshavnar kommuna, sum fer at standa fyri byggingini av einari nýggjari ítróttarhøll í Kollafirði. Hetta varð sligið fast, tá fíggjarætlanin varð samtykt herfyri.

Heðin Mortensen, virkandi borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, sigur, at verkætlan ikki longur er byggiprosjekt hjá kommununi, men verður at rokna sum ítróttarligur stuðul sum alt annað.

Ein partur av arbeiðinum er longu gjørt, t.e. gravað út og planerað, og arbeitt skal nú víðari við at byggja høllina.

Heðin Mortensen sigur, at kostnaðurin verður væntandi á leið 13 mió. kr. Arbeitt verður við sama modellið sum við Hoyvíkshøllini.

Eitt áhugafelag skal setast á stovn, og tað verður so hetta felagið, sum hevur til endamáls at fáa til vega fígging og standa fyri byggingini. Tórshavnar kommuna skal gjalda 30% av kostnaðinum, t.e. uml. 3,9 mió. Landið skal eftir ætlan eisini lata nakað tað sama í stuðuli.

Ítróttarhøllin skal byggjast í sambandi við skúlan, men hetta verður eitt fullkomiliga sjálvstøðugt byggiarbeiði. Miðjað verður ímóti, at kommunan einaferði í framtíðini yvirtekur raksturin av høllini, tá hetta eisini er partur av skúlanum.

Miðjað verður ímóti at seta áhugafelagið á stovn áðrenn nýggjár. Òvist er, nær kollfirðingar sleppa at renna inni í nýggju høllini.

